## Serbaleiðari fríkendur

Fyrrverandi serbiski forsetin Milan Milutinovic varð í gjár fríkendur í altjóða krígsbrotsmannadómstólinum í Haag. Milutinovic, sum tók við sum forseti eftir Slobodan Milosevic í 1997, varð ákærdur fyri krígsbrotsverk ímóti albanska fólkinum í Kosovo seinast í nítiárunum. Men hann bleiv fríkendur, tí sambært dómarunum gjørdi hann ikki annað enn tað, sum hann fekk boð um at gera. Fimm aðrir serbar, sum komu fyri rættin í Haag í gjár, vórðu dømdir sekir og fingu millum 15 og 22 ára fongsul.



## Endurskoða fíggjareftirlitið

Írska stjórnin fer at umskipa leiðsluna í tjóðbankanum, samstundis sum reglurnar um fíggjareftirlitið skulu endurskoðast. Tað segði Brian Cowen, forsætisráðharri, á landsfundi hjá flokkinum Fianna Fail um vikuskiftið. Sum forsætisráðharri er tað uppgávan hjá Brian Cowen at stýra Írlandi ígjøgnum fíggjarkreppuna, og sum tað fyrsta stigið hevur hann gjørt av, at tjóðbankin og fíggjareftirlitið skulu hava felags leiðslu eftir kanadiskari fyrimynd. Írsku bankaleiðslurnar hava verið fyri hvøssum atfinningum, tí mong halda, at teir fáa alt ov góða løn.

# Tvær kvinnur á odda fyri Samfylkingini

**Ingibjörg Sólrún Gísladóttur stillar uppaftur sum floksformaður hjá íslendsku Samfylkingini, men Jóhanna Sigurðardóttur er forsætisráðharraevni og skal leiða valstríð floksins. Men ein gamal kenningur kann spilla teimum spælið**

ÍSLAND
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*


*Jón Baldvin Hannibalsson*


*Jóhonnu Sigurðardóttur*


*Ingibjörg Sólrún Gísladóttur*

Eftir tøgn í nakrar vikur boðaði Ingibjörg Sólrún Gísladóttur á tíðindafundi leygardagin frá, at hon hevði gjørt av at stilla upp til íslendska altingsvalið í apríl, og at hon eisini fer at stilla upp til formansvalið í Samfylkingini, sum stendur fyri durum.

Ingibjörg Sólrún Gísladóttur var uttanlands og leiktaði sær læknahjálp í vetur, og í seinastuni hevur hon havt sjúkrafarloyvi frá Altinginum. Fyri átta døgum síðani segði hon, at hon fór at taka avgerð um sína politisku framtíð um nakrar dagar, og hon kom so leygardagin.

Á tíðindafundinum sat forsætisráðharrin og floksfelagin, Jóahnna Sigurðardóttur, undir liðini á Ingibjörg Sólrún, og tað var ikki av tilvild. Tær báðar hava avrátt, at hóast Ingibjörg Sólrún er og ætlar sær at halda fram sum floksformaður, so er og verður Jóhanna Sigurðardóttur forsætisráðharraevni hjá Samfylkingini. Og tað verður eisini hon, sum skal standa á odda fyri valstríðnum hjá flokkinum upp undir tað komandi altingsvalið.

- Eg haldi, at saman hava vit báðar ta roynd og ta styrki, sum skal til undir verandi umstøðum, segði Ingibjörg Sólrún Gísladóttur á tíðindafundinum. Jóhanna Sigurðardóttur legði afturat, at saman við hinum floksfeløgunum fóru tær báðar at megna at gera tað, sum er neyðugt fyri, at Samfylkingin framhaldandi verður í stjórn.

### Hevði umhugsað framtíðina

Í Íslandi stilla flokkarnir upp í nummarrøð og ikki í bókstavarøð, sum er tað vanliga í Føroyum. Báðar oddakvinnurnar í Samfylkingini stilla upp í Reykjavíkarvaldøminum, og tað er avgjørt, at Jóhanna Sigurðardóttur stillar upp sum 1. valevni og Ingibjörg Sólrún Gísladóttur sum 2. valevni. Men á tíðindafundinum viðgekk Ingibjörg Sólrún, at hon hevði umhugsað sína politisku framtíð, nú hon hevði drigist við álvarsliga sjúku í fimm mánaðir.

- Eg hugsaði av álvara um at taka meg burtur úr politikki. Men eg kom til ta niðurstøðu, at tað hevði verið tað sama sum at slaka fyri sjúku míni, og tí gjørdi eg av at taka bardagan upp, segði Ingibjörg Sólrún Gísladóttur, sum eisini vissaði tíðindafólkini um, at hon verður frísk.

Jóhanna Sigurðardóttir segði, at tað var ikki nøkur sjálvfylgja, at hon skuldi átaka sær at leiða flokkin upp undir valið, men at eingin kann bera seg undan at taka ábyrgd, soleiðis sum samfelagsstøðan er.

### Jón Baldvin bjóðar av

Undan tíðindafundinum hevði Ingibjörg Sólrúnu Gísladóttur fingið eina ávaring. Fyrrverandi javnaðarformaðurin Jón Baldvin Hannibalsson gjørdi í næstsíðstu viku greitt, at eftir hansara tykki átti Ingibjörg Sólrún at leggja frá sær sum floksformaður og at lata Jóhonnu Sigurðardóttir taka við. Gjørdi hon ikki tað, var hann til reiðar at stilla upp til formann á komandi landsfundinum. Og tað ger hann.

- Eg havi onga meiningakanning at halda meg til, men vit eiga at seta okkum sjálvum somu krøv, sum vit seta øðrum, segði Jón Baldvin Hannibalsson við fjølmiðlarnar sunnudagin.

Hann segði seg vera fegnan um, at Jóhanna Sigurðardóttur verður forsætisráðharraevni hjá Samfylkingini.

- Eg stuðli Jóhonnu, eins og øll tjóðin ger, segði tann 70 ára gamli og royndi politikarin, sum nú ætlar sær aftur á ovastu rók.

### FAKTA

**um Jón Baldvin Hannibalsson**
Føddur á Ísafirði 21. februar í 1939.
Útbúgvin hagfrøðingur í Skotlandi, Svøríki og USA
Formaður í Javnaðarflokkinum 1984-
Altingsmaður 1975-1982
Fíggjarmálaráðharri 1987-1988
Uttanríkisráðharri 1988-1995
Sendiharri í Finnlandi 2002-2005

### FAKTA

**um Ingibjörg Sólrún Gísladóttur**
Fødd í Reykjavík tann 31. desember í 1954.
Cand. mag. í sagnfræði við Háskóla Íslands.
Býráðslimur í Reykjavík 1982-1988 og 1994-2006.
Nevndarlimur í Seðlabanka Íslands 2003-2205.
Altingslimur fyri Kvinnulistan 1991-1994
Altingslimur fyri Samfylkingina 2005-
Næstformaður í Samfylkingini 2003-2005.
Formaður í Samfylkingini 2005-
Uttanríkisráðharri 24. mai 2007 til 1. februar 2009.

### FAKTA

**um Jóhonnu Sigurðardóttur**
Fødd í Reykjavík tann 4. oktober í 1942.
Handilsútbúgving 1960.
Nevndarlimur í Verkamannafélagi Reykjavíkur 1976-1983
Næstformaður Javnaðarfloksins 1984-1993
Í formansskapi Altingsins 1979, 1983-1984 og 2003-2007
Almannamálaráðharri 1987-1988, 1988-1991, 1991-1994 og 2007-2009.
Forsætisráðharri 2009-

# Eysturkommuna sagt 22 úr starvi

**Øll 22 innan dagrøktina hjá Eysturkommunu eru søgd úr starvi. – Tað er sjálvandi ikki ein stuttlig avgerð at taka, men vit vóna, at so nógvar av dagrøktarmammunum sum gjørligt søkja aftur, sigur Jóhan Christiansen, borgarstjóri**

UPPSAGNIR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í gjár var fundur, har øll innan dagrøktina í Eysturkommunu fingu at vita, at tey hava mist starvið. Talan er um 18 dagrøktarmammur og tveir leiðarar. Orsøkin til uppsagnirnar eru, sambært borgarstjóranum, bygnaðarbroytingar, ið skulu gerast innan ansingarøkið í kommununi.

- Vit fáa ein nýggjan barnagarð í Leirvík, har 32 vøggustovupláss vera. Hetta hevur við sær, at vit umskipa ansingarøkið, greiðir Jóhan Christiansen frá. Hann leggur afturat, at hann ikki kann garantera at kvinnurnar fáa starv hjá kommununi aftur, tí ongin av kvinnunum er námsfrøðingur.

- Tað eru nógvar ymiskar lógir og reglur, ið gera, at vit ikki kunnu lova teimum starv aftur, staðfestir borgarstjórin í Eysturkommuni.

### Greið tilgongd

Borgarstjórin greiðir somuleiðis frá, at tey hava roynt, at hava eina sera greiða tilgongd í málinum.

- Vit hava syrgt fyri, at alt kundi ganga so greitt fyri seg, sum gjørligt. Vit vilja fegin syrgja fyri, at kvinnurnar, sum hava mist størv síni ikki kenna seg snýttar, fortelur Jóhan Christiansen.

Tá bygnaðarbroytingarnar í Eysturkommunu eru lidnar, roknar borgarstjórin við, at tað vera næstan eins nógv í starvi innan barnaansingina í kommununi sum frammanundan.

- Tað veldst sjálvandi, hvussu mann skipar økið, men eg eri vísur í, at vit við nýggja barnagarðinum fáa eina góða tænastu, sigur Jóhan Christiansen. Tá verða umleið átta dagrøktarmammur í mun til 20 í dag.

Í barnagørðum skulu minst tveir triðingar vera námsfrøðingar, og tað er ongin av dagrøktarmammunum í Eysturkommun, sambært borgarstjóranum.